

Hvat ger ein góður hirði?

Hey, góðu børn!


Her síggja tit ein vaksnan, sum fortelur Hansi, Klæminti, Hannu, Lenu og fleiri eina søgu.

Hesin vaksni spyr: Hvat ger ein hirði?

Og børnini svara: Jú, hann ansar eftir seyðunum, leiðir teir har sum gott gras er. Og onkuntíð má hirðin hjálpa seyðinum, um hann er blivin fastur í onkrum.



Hvussu nógvar seyðir sært tú á myndini? Vita um tú ikki eisini dugir at tekna ein seyð!



Men ein er, sum ansar eftir okkum øllum – eisini teimum, sum ansa eftir djórum.

Vita tit hvør tað er?

Ja – Gud!

Takka Honum fyri, at Hann altíð er hjá tær.

AA fundir, Tórshavn

Leygardagin kl. 17.00, 20.00 og kl. 22.30 í Uppistovu, C. Pløyensgøtu 17.

Sunnudagin kl. 11.00 í Uppistovu. Kl. 17.00 opin fundur í Uppistovu. Øll vælkomin.

Mánadagin kl. 20.00 í Uppistovu.

TIP& VIND

1 X 2

TIPS-dystir

í viku nr. 9
4., 5. og 6. mars

1. Aston Villa–Blackburn
2. Leeds–Sheffield W
3. Leicester–Everton

4. Liverpool–Newcastle
5. Manchester U–Ipswich
6. Norwich–Manchester C

7. Nottingham F.–Tottenham
8. Southampton–Coventry
9. Wimbledon–Queens Park R

10. Barnsley–Oldham
11. Luton–Millwall
12. Reading–Watford
13. Stoke–Derby

TVINGSILSSØLA
Hósdagin
23. mars 1995,
kl. 11.40

verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 35 h, Syðrugøtu (AS nr. 19/95).**

Ognin er eini Fjarðahús frá 1988 í einari hædd við krúpikjallara, vidd 77 kvm. Gjørd úr timbri við harðari tekju. Stykkið er 550 kvm.


Tvingsilssølan er umbiðin av **Friðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 941106),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er um at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann 22. februar 1995
Henrik Engell Rhod
dfm.

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku



Vinnari: Jens Lisberg, Klokkaragøtu 26, Tórshavn

Hvønn leygardag
verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin hesaferð eru allar tær 6 »SKEMT-bøkurnar« hjá Óla Petersen.

Hósdagur
Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, mugu loysnirnar vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendi gátuna til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta« á bjálvan.

Navn

Bústaður

Bygd/býur

